# Leitar tú eftir avbjóðingum ?

## Søkt verður eftir deildarleiðara til deildir okkara á Norðskála og Eiði

**Deildirnar hava sum høvuðsendamál at taka sær av dagliga kundaviðskiftinum á økinum.**

**Uppgávurnar hjá leiðaranum eru:**
- hava dagligu leiðsluna og skipa arbeiði á deildini
- skapa eitt mennandi og avbjóðandi arbeiðspláss
- tryggja at ráðgevingin og tænastan eru á høgum støði
- útinnan av kredittmetingum
- uppfylging av deildarroknskapi og fíggjarætlan
- umframt aðrar uppgávur álagdar av stjórnini

**Førleikakrøv:**
- Peningastovnsútbúgving við "Finansiel Videreuddannelse" ella HA, HD, Bachelor ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til EDV
- duga at málbera seg í skrivt og talu

Umsøkjarar, ið hava peningastovnsroyndir og/ella leiðararoyndir hava fyrimun.

**Persónligir eginleikar:**
- duga at arbeiða sjálvstøðugt og tora at taka avgerðir
- hava góð evni at umstilla seg í einum broytiligum umhvørvi
- hava góð samstarvsevni og evni at leiða ein bólk í einum kravmiklum umhvørvi

Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg fakliga og persónliga.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, ella Bjarna Olsen, stjóra, tel. 348000.

Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu.

Umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 20. august 2001, og sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

**FØROYA SPARIKASSI**

Starvsfólkadeildin,Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
E-post: Starvsfólkadeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið, ið serliga fáast við at veita ráðgeving, fígging og selja tænastur Sparikassans.

**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

DANAK
DNV

**FARPACK**

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
**www.farpack.com**

## KVØLDSKRÁ Á HANDILSSKÚLANUM

### INNSKRIVINGARSEÐIL, heysthálvan 2001

| | |
|---|---|
| Ættarnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Tel heima: |
| Gøta: | |
| Postnr./bygd býur: | Teldupost adr.: |
| Starv/arbeiðspláss: | Tel arbeiðspláss: |

**FHS-stakroyndir** (setið kross)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Enskt C | hósd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Virkisbúskapur C | mikud. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Kunningartøkni C | mánad. og mikud. | 20.30-22.00 | ☐ |
| Marknaðarførsla C | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |

**Próvtøkur í mars/apríl**

**HH-stakroyndir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Støddfrøði B-stigi (Kravt til TSÚ og HD) | týsd. og hósd. | 20.15-21.45 | ☐ |
| Virkisbúskapur B-stigi | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |

**Próvtøkur í mai/juni**

**Merkonom**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Leiðsla og samstarv | mikud. | 18.00-20.30 | ☐ |
| *Virkisfyriskipan | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| *Virkisbúskapur | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| *Millumlanda vinnul.rættur | mikud. | 18.00-20.30 | ☐ |
| *KT í fyrisitingini | hósd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| **Búskaparstýring | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| **Starvsfólkamenning | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| **Fyrisitingarlig skipan | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |

* 45 tíma lærugrein. Próvtøka í des. 2001/jan. 2002
** 90 tíma lærugrein. Próvtøka í mai 2002

**Kostnaður:**

| | |
|---|---|
| Merkonom, luttøkugjald: | kr. **400,00** fyri lærugreinar har próvtøkan er í des./jan. (lærugreinin er 45 tímar) |
| Merkonom, luttøkugjald: | kr. **600,00** fyri lærugreinar har próvtøkan er í mai 2002 (lærugreinin er 90 tímar) |
| Depositum: | kr. **250,00** fyri hvønn persón. |

**Serligar fortreytir:**

Í nøkrum merkonomlærugreinum eru umframt vanligu fortreytirnar eisini serligar fortreytir kravdar.
- Í Virkisbúskapi krevst kunnleiki til roknskap svarandi til 30 tíma undirvísing.
- Í Búskaparstýring krevst, at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisbúskapi og Ársroknskapi og Greining og fígging.
- Í Starvsfólkamenning krevst, at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Arbeiðsrætti, Leiðsla og samstarv og Starvsfólkafyrisiting.
- Í Fyrisitingarlig skipan krevst, at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í KT í fyrisitingini og Starvsfólkafyrisiting.

**Ivast tú, ring og spyr eftir vegleiðara**

Freistin at tekna seg til kvøldskúlan er 10. august 2001. Skúlagongdin byrjar 27. august 2001. Øll undirvísing er reytað av nóg stórari undirtøku. Skúlin er stongdur frá 8. juli til 8. august 2001.

Hygg annars á heimasíðu skúlans www.hsh.fo undir serstøk upptøkukrøv, frítøka, breytir.

**undirskrift/dagur**

FØROYA HANDILSSKÚLI
Postrúm 177 - 110 Tórshavn - Tel 317177 - Fax 313374
hsh@hsh.fo

Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3211

Navn: Sp/f P.E.Consulting
Hjánavn: Sp/f OSR Faroes (Sp/f P.E. Consulting), Sp/f OSR Føroyar (Sp/f P.E. Consulting), Sp/f OSR (Sp/f P.E. Consulting), Sp/f Oil Spill Recovery (Sp/f P.E. Consulting), Sp/f Oil Spill Recovery Faroes (Sp/f P.E. Consulting) og Sp/f Oil Spill Recovery Føroyar (Sp/f P.E. Consulting)
Adressa: 826 Trongisvágur

Kommuna: Froðbiar Kommuna
Stovningardato: 05.07.2001
Viðtøkudato: 05.07.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Pauli Steen Einarsson, 826 Trongisvágur.
Stjórn: Pauli Steen Einarsson, 826 Trongisvágur.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 05.07.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og ídnað herundir íløgur í onnur feløg.

Skráseting Føroya tann 2. august 2001

Kristin Balle

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg



# Soleiðis býta rock-stjørnur pengarnar



*Kendir rock- og poppbólkar eru pengamaskinur. Men ymiskt er hvussu limirnir í bólkinum býta vinningin millum sín*

**Noel Gallager tekur tað mesta. Bono, Edge, Mullen og Clayton úr U2 býta javnt við teirra managara. Queen fóru upp at klandrast um, hvussu býtast skuldi, tá pengar byrjaðu at koma inn. Les her, hvussu ymiskt ymiskir rockbólkar býta inntøkurnar koma**

TÓNLEIKUR
*Niclas Johannesen*

Neyvan mann tað vera við tankanum um cool cash, at tannáringar standa við naglakulda í kjallaranum við einum rockdreymi í búkinum. Men hvat so, tá tað brádliga hendir? Dreymur gerst veruleiki og søgan um fátækar unglingar, sum í snarari vend gerast múgvandi rockstjørnur, eru fleiri.

Ymiskt er, hvussu ymisku bólkarnir finna út av at býta, tá tað byrja at fossa inn, og í summum førum er góði viljin ikki nóg mikið.

## 'Eg geri arbeiðið!'

Vanliga er alt gaman í innanborðs í bólkinum - tað vil siga inntil ta løtuna, tá eitt hit-lag er í kassanum og royalti kekkurin kemur. Sum kunnugt er tað tann, teir ella tey, ið skrivað hava løgini, sum fara við pengunum.

Tað heldur Noel Gallagher úr enska bólkinum Oasis vera púrasta upp á pláss. Av plátuni Be Here Now, sum kom út í 1997, fór Noel Gallagher avstað við 47 prosentum av inntøkunum, meðan hinir fýra limir sluppu at býta restina sínamillum - 13.06 prosent ípart.

Órímuligt? Nix, sigur Noel: "Tað eri eg, sum siti uppi til klokkan sjey á morgni og royni at skriva løg til útgávuna, og eg góðtaki ikki, at ein basslinja ella ein trummupartur hevur nakrantíð gjørt ein sang betri." Men Noel er kortini ikki so ringur, sum hann ljóðar. Søgur vilja vera við, at hvørja fer ein feitur publishingtjekkur kemur til hansara, so kemur ein góður sosialistur í hann, og hann gevur hinum burturav.

## Klandur í Queen

Publishingpengar vera rindaðir fyri hvørja framleitta eind og fyri hvørt lag, sum er á hesi eind. Soleiðis gjørdist vátt í reiðrinum hjá liminum í Queen, tá teirra "Bohemian Rhapsody" seldi í milliónvís av eintøkum. Freddie Mercury hevði skrivað Bohemian Rhapsody, og á b-síðuni var ikki serliga kenda lagið "I'm In Love With My Car", sum trummuspælarin Roger Taylor hevði skrivað. Vanlig mannagongd innan publishing er, at tú verður rindaður fyri hvørt lag og hvørt framleitt eintak. Sostatt tjenti Roger Taylor líka nógv upp á eitt 'b' lag, sum Freddie Mercury gjørdi upp á størsta hitlagið, hann nakrantíð skrivaði. Guitaleikarin Brian May viðgekk eisini, at limirnir í bólkinum høvdu keglast um pengar líka síðani teir funnu útav at Roger Taylor tjenti hundraðtúsundtals krónur meira enn teir, bara upp á eitt slíkt b-lag.

Tá Freddie Mercury gjørdist sjúkur, var tað sum um at allir limirnir í bólkinum løgdu gamalt handilsagg aftur um. Tá útgávan Miracle kom út í 1989, býttu teir fýra limirnir javnt millum sín. Onki hokus pokus, bara 25 prosent í part. "Tú trýrt ikki, hvussu deiligt tað er, tá limirnir í bólkinum eru javnt settir á øllum økjum. Tú ert ikki longur partískur, tá tað snýr seg um at velja, hvat lag skal vera single-lag", hevur Brian May síðani sagt.

Samstundis iðrar fyrrverandi høvuðssangskrivarin í Pink Floyd Roger Waters seg grønan um, at hann á klassisku útgávuni Dark Side Of The Moon gav trummuspælaranum Nick Mason øll publishingrættindini til lagið "Speak To Me". "Vit gingu inn fyri samhaldi tá á døgum. Eg iðri meg ólukksáligt í dag", hevur Pink Floyd grundleggjarin sagt.

Og so var tað rockmartyrurin Kurt Cobain, sum mundi gjørt enda á Nirvana, áðrenn bólkurin fór at innspæla útgávuna In Utero. Hóast sangskrivarin í Nirvana var mestsum horvin í narkotiskari elendigheit, so megnaði hann at tvinga broyting ígjøgnum soleiðis, at minni var til hinar báðar limirnar í bólkinum Krist Novoselic og Dave Grohl.

## Fara solo

Tað finnast eisini fleiri dømi um oddamenn, sum fara solovegin, tá teir finna útav, hvussu nógv meira teir kunnu tjena tann vegin. Sting er eitt dømi. Á plátuni Regatta De Blanc fekk høvuðssangskrivarin í Police 35 prosent av royalties, meðan restin var nøkulunda javnt býtt millum teir báðar Andy Summers og Stewart Copeland. Hóast hinir báðir skrivaðu løg, so var Sting maðurin aftan fyri so at siga øll hit-løgini hjá Police. Haraftrat býtti Sting eisini publishing-inntøkurnar javnt við hinar limirnar í bólkinum.

Sama gera báðir høvuðssangskrivarnir í Aerosmith. Steve Tyler og Joe Perry býta allar publishingpengarnar javnt við hinar limirnar í bólkinum.

Ella kann man fara beint øvugta vegin og eisini gera sum Mick Hucknall úr Simply Red. Aftan á stóru hit-plátuna Stars valdi hann at gerast einasti limurin í bólkinum. Allir hinir fáa fasta løn. Soleiðis fekk Hucknall 100 prosent av inntøkunum frá plátuni Life, sum kom út í 1995.

Ongin ivi valdar um, at tað kann vera ringt at finna røttu javnvágina, tá býtast skal, og í døgum, har stórur partur av nýggja dancetónleikinum er grundaður á samplingar frá gomlum sangum, er tað vorðið uppaftur verri at gjøgnumskoða. Í fleiri førum fara upp til 66 prosent av publishing-inntøkunum til tey, sum hava skrivað løgini, sum samplað verður frá.

Og so eru tað bólkar, sum bara finna útav tí saman - heilt frá byrjan av. Tað hevur aldrin verið nakað roks við írska rockbólkinum U2. Heilt frá byrjan av valdu teir fýra limirnir at býta javnt millum sín og teirra managara. Allir fimm - managarin Paul McGuinnes íroknaður - fáa 20 prosent í part av øllum inntøkum, sum U2 hava. Og hetta sær út til at virka frálíkt.

Ongin teirra líður fíggjarliga neyð. Teir eru verdir meira enn eina milliard krónur í part.

